Skills 4 ReUse | Nordic Sustainable Construction

# Læraravegleiðing: 2.1.3 Sjónband við fyrimynd

**Evni**

- Fyrimynd
- Endurnýtsla
- Snið til niðurtøku
- Trækonstruktiónir

**Mælt tíðarlongd**

25 min.

**Viður**

Undirvísingartilfar til skeið um endurnýtsluviður í bygging

## Innleiðsla

Í tilfarinum er eitt sjónband, sum vísir eina fyrimynd – ein persónur, sum dagliga arbeiðir við bygging og endurnýttum træi. Fyrimyndin tosar um fyrimunirnar við at arbeiða við endurnýtslu, góðskuna á endurnýttum træi, hvussu tey nýta tað í sínum dagliga lívi, og hvussu ymiskar byggingar og konstruktiónir hóska væl til hetta.

Til sjónbandið er eisini eitt uppgávublað við spurningum til lærlingin, sum tryggjar, at lærlingurin arbeiðir við viðkomandi evnum, sum gera tað møguligt at røkka lærumálunum í tilfarinum.

At enda verður vitanardeiling í flokkinum, har lærlingurin fær møguleika at deila síni svar uppá spurningarnar í uppgávubløðunum og hugsa um innihaldið í sjónbandinum.

## Fyrireiking

Lærarin skal:

- Kunna um tilfarið/gongdina
- Byrja við at seta lærlingin í gongd við at hyggja at sjónbandið
- Hjálpa lærlinginum við at svara uppgávubløðunum.
- Stýra vitanardeilingini og geva øllum luttakarum møguleika at leggja síni svar fram til uppgávurnar, umframt at leggja afturat spurningum, forkláringum og viðmerkingum.
- Hjálpa við at greiða frá svarum hjá uttakaranum og skriva tey sum felags floksviðmerking.

Luttakarin skal:

- Kunna síggja og hoyra sjónbandið
- Kunna greiða frá (deila vitan) við at svara spurningunum í uppgávuni
- Kunna lurta eftir svarum hjá øðrum luttakarum
- Kunna tekna/skriva viðmerkingar, sum hjálpa teimum at minnast sína vitan og sínar meiningar.

# Lærervejledning: 2.2.3 Hvor kan materialet anvendes?

Skipan:

- Undirvísingin verður leidd við eini blanding av sjálvstøðugum arbeiði og bólkaarbeiði. Luttakararnir kunnu luttaka í undirvísingini sjálvstøðugt ella í smærri bólkum.

## Læringamál

- Lærlingurin kann greiða frá samanhanginum millum niðurtøku og endurnýtslu av trævørum
- Lærlingurin fær fatan av virðisskapan gjøgnum endurnýtslu og endurvinning av trævørum

## Innihald og endamál

Endamálið við innihaldinum er at geva lærlinginum vitan um møguleikarnar við at endurnýta trævørur til nýbygging. Í hesum føri til sekundera bygging í form av skúrar.

## Uppskot til undirvísingargongd

Lærarin byrjar undirvísingina og leggur tilfarið/gongdina fram (5 min)

- Innleiðing/endurinnleiðing til heimasíðuna.

Sjónband (5 min)

- Lærlingurin hyggur at sjónbandið.

Uppgávur til sjónbandið (10 min)

- Eftir at lærlingarnir hava sæð sjónbandið, skulu teir arbeiða við at svara spurningum og loysa uppgávur tengdar at evninum, ið tryggjar, at lærlingurin viðger innihaldið í mun til lærumálini.

Samandráttur í felag (5 min)

- Lærarin stýrir einari samanumtøku av nýggju vitanini, sum lærlingurin hevur fingið.

## Sundurgreining

Førleikin hjá luttakaran til at fata og hugsa um innihaldið í sjónbandinum, umframt at leita eftir vitan um evnið, ger tað møguligt at geva meira ella minni framkomin boð uppí vitanardeilingina.

## Feedback og meting

Við hvørjum íkasti fær luttakarin beinleiðis feedback frá lælraranum, tá lærarin hjálpir við at greiða frá grundgevingunum, áðrenn íkasti verður skrivað á talvuna. Luttakarin upplivir, at 'góð' boð verða góðtikin og skrivað beinleiðis á talvuna, meðan ógreið/skeiv íkast verða tillagað/endurtulkað í samstarvi millum læraran og luttakaran, áðrenn tey verða skrivað á talvuna.